## DAGSINS MEINING

### Bjartskygni og framburður

Nú vit í eina tíð nærum bara hava hoyrt um myrk skýggj og ringar veðurvánir á búskaparliga økinum, ber ikki til at fella í fátt og missa trúnna uppá framtíðina. Tí soleingi her býr gott fólk og soleingi vit eiga lut í stórum tilfeingi, ið náttúran hevur latið okkum, so er ljós fyri framman. Sjálvandi skulu vit vera realistisk og viðgera tey krepputekin, sum eru og sum koma, í størsta álvara, men hetta má ikki sleppa at taka áræði og dirvi, vit og skil frá okkum.

Frálíka sendingin í Útvarpi Føroya týskvøldið um nýggju røkurnar í fiskivinnuni, um gransking og framtíðar troytan av okkara stóra og ríka tilfeingi, eigur at fáa tey, sum púra hava mist vónina, at hugsa seg um aftur. Tí her liggja í veruleikanum ófatiliga stórir møguleikar. Tað ræður "bara" um at síggja teir, kanna (granska) teir og troyta teir. Tað ræður um vilja, dirvi, kunning, royndir og so eisini trúgv og síðani pengar. Nettupp hetta við pengum er kanska tað torførasta, og tí mugu vit til at seta ljóskastaran á hetta eina økið serstakliga, sum jú er fyritreytin undir øllum hinum: hvussu fáa vit kapital til at seta í gongd, til at granska og til at fullføra! Hetta eigur at vera eitt tað mesta umráðandi málið, sum bæði almenn og privat í Føroyum eiga at arbeiða við og hugsa um. Tí avgjørdi veruleikin er, at vit hava ikki ráð at lata vera.

So tá vit hava havt eitt stýri, sum hevur lagt alstóran dent á at menna nýggjar vinnur sum KT og vit hava fingið eitt nýtt stýri við einum løgmanni, sum undir øllum valstríðnum legði størsta dentin á nettupp hetta sama: at menna vinnuna uppá longri sikt og harvið eisini økja um granskingina, so skuldi verið lagamanni, tá skuldu tær politisku barrierurnar verið burtur, tá skuldi borið til at arbeitt uppá tvørs av flokspolitiskum forðingum. Tí skal tað vera vón okkara, at øll tann politiska skipanin tekur saman hendur við privata vinnulívinum og góðum kreftum í útlandinum um at raðfesta hægst framtíðar granskingina, sum skal føra til nýggj arbeiðspláss og meirvirði úr okkara verandi tilfeingi.

ÚF sendingin viðgjørdi høvdavirkið í Lorvík og víðari ætlaninar hjá Atlantic Marine Products. Eitt virki, sum fremur nýhugsan og leitar á nýggjar marknaðir. Eitt felag, sum á høgum støði vil hava uppaftur meira burtur úr tí vit longu eiga frammanundan, fiskinum. Men ein forðing er: kapitalur. Her má vend koma í. Vit hava longu sæð tað almenna taka nýggj tøk, t.d. granskingarætlanin hjá Fiskimálaráðnum. Frálíkt. Men hetta er ikki nokk. Vit mugu og skulu hava uppaftur meira kapital til at koma víðari. Eitt uppskot kundi verið, at peningurin til førleikamenning frá oljuvinnuni, eisini varð brúktur til gransking á fiskivinnuøkinum, umframt at hann eisini kom mentanini til góðar. Mentan og vinna eiga og skulu fylgjast at, tí tey eru eitt og tað sama í samfelagsmmenningini, sum bæði verðslig og andalig. Sjálvandi skulu vit førleikamenna okkum til eina komandi oljuframtíð. Tað gera vit longu. Men hví ikki stovna ein grunn, sum kann stuðla "íløgum" í framtíðina, ein grunn, har almennir, privatir og oljupengar í felag eru við til at styrkja okkara høvuðsbein, fiskivinnuna, meðan vit arbeiða fram ímóti at fáa hitt beinið, eina oljuvinnu, fast undir fótum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Hava vit øll misskilt grundarlagið aftan fyri stýrisskipan okkara?

**Kristina Samuelsen**
*løgfrøðingur*



Nú letur til, at tað skjótt eru advokatar frá øllum skrivstovunum í býnum, ið hava ført fram, at landsstýrismálanevndin tekur sær leiklut sum dømandi myndugleiki.

Valdsbýtislæran hjá Montesquieus, sum vit við stýrisskipanarlógini hava staðfest at galda fyri okkara stýrisskipan, býtir valdið í trý, soleiðis at lógirnar verða gjørdar av løgtinginum og løgmanni í felag, umsitingina av lógunum skal landsstýrið taka sær av, og tulkingin av lógunum er løgd til dómstólarnar.

Men kann man hugsa sær, at Løgtingið ger sínar lógir so neyvar, at rásarúmið verður tikið frá umsitingini, ella at lógirnar kanska enntá blíva dómar í sær sjálvum? Kann man hugsa sær, at landsstýrið ikki letur seg binda av lógarinnar karmum, ella ikki broytir sínar mannagongdir í samsvari við ein sagdan dóm? Og kann man hugsa sær, at dómstólarnir ikki leggja lógirnar hjá løgtinginum ella kunngerðirnar hjá landsstýrinum til grund fyri sínar avgerðir?

Kunnu reglurnar í stýrisskipanarlógini í sær sjálvum tryggja at hetta ikki hendur, og hvussu vita vit nær eitt av teimum trimum - Løgtingið, landsstýrið ella dómstólarnir - eru farin út um mark?

Svarið til hendan spurningin finna vit eisini í valdsbýtislæruni, hvørs grundhugsan er ikki bara at skapa eitt valdsbýti, men eisini at tryggja ein valdsjavna millum tey trý valdini, ið kann verja borgarin ímóti tilvildarligum inntrivum.

Uppgávan hjá løgtinginum, landsstýrinum og dómstólunum er sostatt ikki bara ávikavist at lóggeva, útinna og døma, men minst líka nógv at hava eftirlit við og tryggja, at valdsjavnin millum myndugleikarnar verður hildin. Fer Løgtingið t.d. inn um markið hjá landsstýrinum, og landsstýrið letur hetta henda, so merkir hetta eina forskjóting í valdsjavnanum.

Tað er sostatt løgmaður sjálvur, ið setur rættartrygdina í vága, um hann t.d. staðfestir eina útinnandi ella dømandi lóg. Somuleiðis setur Løgtingið rættartrygdina í vága, um tað t.d. ikki hevur eftirlitið við og tryggjar, at landsstýrið fylgir teimum lógarkarmum, ið Løgtingið hevur ásett.

Løgtingið útinnir sítt eftirlit við landsstýrinum á ymiskan hátt. Tað kann verða við fyrispurningum til løgmann og landsstýrismenn, við at løgtingsins umboðsmaður tekur eitt mál upp, við grannskoðan av landsins roknskapum, við at eitt mál verður lagt til kanningarstjóra, ella við at mál verða tikin upp í landsstýrismálanevndini. Landsstýrið hevur ikki skyldu til at fylgja niðurstøðunum hjá løgtingsins umboðsmanni, løgtingsgrannskoðarunum, kanningarstjóra ella landsstýrismálanevndini, og dómstólarnir kunnu til eina og hvørja tíð koma til eina aðra niðurstøðu.

Tað at løgtingsgrannskoðarnir leggja frágreiðing fyri Løgtingið, har teir gera vart við og føra síni sjónarmið fram um møgulig frávik millum fíggjarlóg og roknskap, gevur ikki hesum niðurstøðum dømandi eginleika. Heldur ikki hóast Løgtingið tekur undir við einum uppskoti til samtyktar um góðkenning av roknskapinum, har víst verður til frágreiðingina frá løgtingsgrannskoðarunum.

So mikið minnið gevur tað niðurstøðunum hjá landsstýrismálanevndini dømandi eginleika, hóast tær verða gjørdar í og av eini tingnevnd.

Spurnartekin kann setast við hvørt skipanin við landsstýrismálanevndini er tann rætta skipanin fyri okkum, eins og spurnartekin kann setast við eina og hvørja skipan, alt eftir tíð og stað. Men orsøkin til, at landsstýrismálanevndin ikki skuldi verið rætta skipanin, er ikki tann, at hon tekur sær dømandi eginleika, tí tað ger hon ikki. Orsøkin er heldur ikki tann, at skipanin ikki kann veita tingmonnum trygd fyri, at avgerðirnar, ið tiknar verða, ikki kunnu broytast av dómstólunum, tí tað kann eingin skipan júst av tí somu grund, at avgerðirnar ikki eru dømandi. Norra og Týskland hava eisini skipanir, ið líkjast landsstýrismálanevndini, og sum entá eru meira víttgangandi. Ein hevur ilt við at fáa seg at trúgva, at hesi lond skulu hava misskilt innihaldið í valdsbýtislæruni.

Valdsjavnin millum teir tríggir myndugleikarnir er ikki givin frammanundan. Tað vilja altíð kunna førast ymiskar meiningar fram um, hvar markið skal ganga millum tað lóggevandi, útinnandi og tað dømandi valdið. Hvør av hesum meiningunum vinnur frama vil til eina og hvørja tíð verða stýrt av styrkislutfallinum millum Løgtingið, landsstýrið og dómstólarnar. Heldur Løgtingið sostatt, at løgmaður fer út um mark við ikki at staðfesta eina lóg, ið Løgtingið hevur samtykt við stórum meiriluta, so má Løgtingið seta sína styrki aftanfyri avgerðina við at geva løgmanni misálit. Fæst ikki meiriluti fyri hesum, so nyttar tað einki at vísa sína ómegd við at lasta skipanina, tí hon virkar í einum slíkum føri júst sum hon skal.

Trýstið á tann ella tey, ið fáa tað í sín lut at verja borg fyri valdsjavnanum, er stórt. Tað skal tí nógv til, áðrenn løgmaður letur vera við at staðfesta eina lóg, og áðrenn dómstólarnir døma eina lóg ella kunngerð at vera stríðandi móti yvirskipaðari reglu. Somuleiðis krevur tað dirvi at verða nevndarlimur í landsstýrismálanevndini. Men vald fæst ikki uttan ábyrgd.

Hvat rætta løgfrøðiliga niðurstøðan er í einum ávísum máli, er ein heilt annar spurningur, ið helst ikki skal koyrast av sporinum, við grundgevingum um, at skipanin ikki virkar.

Møguliga kunnu sakarmál um slík mál tykjast margháttlig, men tað, sum eftir mínum tykki er tað margháttliga, er, at báðir partarnir føra samsvarandi sjónarmið fram, um at niðurstøðan hjá lóggevandi valdinum er skeiv.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Jón Brian Hvidtfeldt jonbrian@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard ave@post.olivant.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



# Framleiðsla av russaratoski vil skapað støðugt arbeiði í Vági

**Johan Dahl**
*løgtingsmaður*



Hósdagin fyri eg var frákoyrdur sum landsstýrismaður í fiskivinnumálum, hevði eg ein óformellan fund á fiskavirking við Meinhard Jacobsen, stjóra, um støðuna í Vági og hvussu lunnar kundu leggjast undir støðugt arbeiði, ið kundi samansjóðast við verandi framleiðslu á fyrrverandi Polarfrost.

Niðurstøðan varð, at besta boðið upp á støðuga framleiðslu var at fara undir at virka vøru burtur úr russaratoski í Vági, men fyri at hetta skal lata seg gera, so er neyðugt, at fiskivinnumenning á landi fær størri upphædd á ráða yvir, so tær 1,10 pr. kg sum áður vóru veittar sum ein refusión upp á eykatollin av 3. landsvøruni aftur verða veittar.

Meinhard metti, at hetta virksemið kundi byrja við heilt stuttum skoðbrá.

Avtalað var at tosast skuldi saman aftur, eftir at eitt roknistykki varð sett upp hesum viðvíkjandi, sum lýstu fíggjarligu avleiðingarnar fyri landið og fiskavirking.

Verður hendan ætlan sett í verk, sum eg vóni, so verða tað ca. 40 støðug arbeispláss í Vági, eins og at javnvág kann finnast millum slátur av laksi og virking av russarafiski, so arbeiði verður hvønn dag.

Eisini er avgjørdi eg í samráð við løgmann og umboð fyri samgonguflokkarnar at seta ein arbeiðsbólk við limum úr samgonguni, sum saman við vinnuni í Suðuroynni og ørðum skal royna at finna berandi loysnir fyri oynna.

Hesin bólkur fer eftir ætlan á virkisvitjan í Suðri í næstum.

# Ðið

## Eg ákæri (onkran), tí føroyskt er ikki torført at stava!

**Eyðun á Borg**
*Argir*



Ein kanning vísir, at miðnámsnæmingar duga illa at stava. Teir duga ikki at seta ð á rætt pláss.

Sum mállærari (fø/en/da) noyðist eg at staðfesta, at rættskrivingin hjá nógvum føroyingum er heldur vánalig. Her verður ikki bert hugsað um næmingar. Fjølmiðlafólk og eisini fleiri skúlafólk og onnur við góðari útbúgving hava trupulleikar við t.d. eddinum.

Spurningurin er so, hví so nógv fólk duga so illa at stava!? Ja, neyvan er tað tí, at føroyskt er torført at stava. Tað kann ikki vera orsøkin. Samanbera vit t.d. við enskt mál og nevna eini tvey orð, t.d. teacher (lærari) og beautiful (vøkur), so sæst, at føroysk stavseting er lættari /einfaldari, tí hon líkist framburðinum (úttaluni) so nógv. Franskt mál, t.d., er uppaftur truplari enn enskt, tí munurin millum stavseting og úttalu er sera stórur. Kortini ber til at læra at skriva hasi málini, hví so ikki føroyskt? Annars hevur danskt mál eisini bókstavir, sum ikki verða frambornir (d og g)!

**Málslig líkasæla ella - - - ?**
Hvat er so galið hjá okkum í Føroyum? Er okkurt, sum ikki ruggar rætt við undirvísingini í fólkaskúlanum, miðnámsskúlanum og Læraraskúlanum? Gera vit okkum ikki nóg stóran ómak at læra næmingarnar føroyska rættskriving? Tað er ikki so torført at seta hatta eddið á rætt pláss (sí *snarskeið* seinast í greinini!). Er kanska talan um málsliga líkasælu? "Hatta er bara føroyskt, og tað er so sera torført at læra", vil onkur kanska vera við. Leggja vit so stóran dent á onnur mál, sum vit sjálvandi eisini skulu duga, at vit hava lyndi til at gera ov lítið við okkara egna mál? Hava vit ov lítið av føroyskum undirvísingartilfari? Verða vit kanska í hesum talgildu fylgisveinatíðum so undiroyst av útlendskum máli (sjónvarp, Alnet o.s.fr.), at vit leggja minni dent á egið mál og egna stavseting?

**Fjølmiðlafólk mugu á málskeið!!**
Tað eru alt ov nógvar stavivillur (ð-villur) í føroysku bløðunum! Har má okkurt gerast! Útvarps- og sjónvarpsfólk sleppa frá at vísa, hvussu væl/illa tey duga at stava, men málsliga eru fleiri av teimum ikki nóg væl fyri! Hægri málslig krøv mugu setast fólki, ið hava móðurmálið sum starvsøki í útvarpi, sjónvarpi, bløðum o.s.fr.

Lærarar, sum lesa niðri, mugu á móðurmálsskeið, áðrenn teir sleppa at undirvísa í Føroyum. Fjølmiðlafólk áttu avgjørt at farið á málskeið, tá tey eftir lokna útbúgving koma aftur av Flatlondum. Blaðfólk við ongari útbúgving mugu sjálvsagt eisini á málskeið. Gerið okkurt við "málið", bløð og fjølmiðlayrkisfeløg! Bløðini mugu eisini hava málsligar ráðgevar. Ja, eg veit, at tað er trupult við evstamarkinum. Í hesum viðfangi má eg eisini nevna sjónvarpsbløðini hjá Dimmalætting og Sosialinum. Í teimum er ein løgin vavgreytur av føroyskum, donskum og enskum. Sum støðan er, hevði tað kanska verið betri ikki at umsett sjónvarpsskráirnar til føroyskt!?!

Dagbløðini, Dimmalætting og Sosialurin, hava sínar stavivillur, men eg verði eitt sindur kløkkur, tá eg síggi onkra ð-villu á fyrstu síðu í vikublaðnum Fregnum!?! Ikki minni kløkkur gjørdist eg, tá eg í sjálvari oddagreinini, sum snúði seg um stavseting og lærarar, fann eina ð-villu!?! Líkasæla!?! Nei, eg hugsi, at talan mundi vera um eina prentvillu! Annars frálík oddagrein!

**Skúlaøkið**
Stavivillurnar í føroyskum eru ov nógvar, tá næmingarnir fara úr 9. fl. og 10. fl. Duga vit lærarar ikki nóg væl at læra næmingarnar at seta ð? Duga summir lærarar ikki nóg væl sjálvir at seta ð? Er tað okkurt annað, sum bagir?

Sjálvur noyðist eg at taka í egnan barm. Tað hendir ikki so sjáldan, at eg ógvist við, tá eg síggi til dømis ð-villurnar hjá einum næmingi, sum eg havi verið lærari hjá í 9 ella 10 ár !?! Er talan um líkasælu, dugnaloysi, ella er tað bara so trupult at vera eitt so lítið mál, sum verður kroyst og hótt av øðrum størri málum?

Mangt gott og virðismikið hevur til dømis Bókadeild Føroya Lærarafelags givið út. Tó harmist eg um, at til dømis Skúlablaðið ikki altíð er heilt lýtaleyst málsliga. Okkurt orð, sum eg havi havt í blaðnum, hevur enntá verið skeivt "rættað".

Dunnaldur Dunna (Anders And) er umsettur til føroyskt (frálíkt tiltak, væl umsett, haldið fram við tí!), men hví eru fleiri stavivillur í bløðunum, m. a. ð-villur? Líkasæla ella - - -?

Í Pisubókini lærdu/læra vit bókstavirnar, til dømis fyrra a, apa, seinna æ, ær. Á bókstavatalvum nú á døgum stendur tó: a, appilsin. Hava vit nú á døgum lyndi til at gloyma fyrra a, sum í t. d. aling, akur, atkvøða, spaki, hav, garður, tak? Fleiri næmingar skriva seinna æ í áðurnevndu orðum. (Sjálvandi skulu næmingarnir eisini læra, at vit siga **a** í *takk*, tvs. tá 2 hjáljóð koma aftaná).

Løgið er annars at hoyra sjálvt starvsfólk á Dimmalætting siga "Dimmalettíng". Einans suðuroyingar eiga at siga "Dimmalettíng"!

**Andsøgnin: Tey "ólærdu" duga at stava!?!**
Rættiliga ørkymlaður gjørdist eg einaferð, tá eg í Dimmalætting las eina grein hjá málfrøðingi og orðabókarrithøvundi (Donsk/føroysk orðabók, Fróðskaparfelagið, hin "frílynta"). Stavivillur vóru í greinini (ð-villur)! Mundi tað vera við vilja, fyri at arga, ella bert líkasæla? Her má eg samanbera við eina gamla skyldkonu, sum býr og hevur búð á Flatlondum meginpartin av lívi sínum. Lítla og onga undirvísing hevur hon havt í føroyskum, men hon dugir at skriva føroyskt og veit, hvar **eddini** skulu standa. Eg veit um fleiri onnur dømi, har tann vanligi, tilkomni føroyingurin við 7 ára skúlagongd dugir at seta ð. Tú spyrt teg sjálvan, um okkurt er heilt galið við málundirvísing okkara nú á døgum!?!

Kanska kann tað tykjast eitt sindur smáligt at leita eftir villum, soleiðis sum eg havi gjørt í hesi grein. Fólk, sum skriva og hava málið sum sítt starvsøki, gera sum heild eitt gott arbeiði, og gott er, at onkur arbeiðir við málinum; men kortini eiga vit at seta størri krøv til fólk, sum alment arbeiða við móðurmálinum.

**"Er det oppebåret?"/ Málsligur hugburður**
Ein tíðindamaður spurdi ein dana, um okkurt var "oppebåret". Føroyingar á gosi! Tú kanst ikki fara so við tí danska málinum. Sjálvur fegnist eg um, at tað onkuntíð er danskt, sum verður ávirkað av føroyskum, tí tað er so sera, sera sjáldan. Men hvussu hevði føroyingurin sagt á "føroyskum"? Jú, hann hevði sagt: "Var tað fortjent?" Tað heldur fjøldin vera í fínasta lagi.

Ein fyrrverandi løgmaður tosaði í Útvarpinum um "vanskiligar forhandlingar". Vit varnast tað neyvan. Hugsið tykkum, um vit vendu byttuni, at Fogh ella Nyrup tosaðu um "torføre samrådinger"!?!

Sjálvur undirvísi eg ensktalandi útlendingum í føroyskum. Tað er sera forvitnisligt. Teir duga ikki danskt og eru tí púra "óspiltir" av danskari ávirkan. Í kvøldskúlanum hava vit m.a. tosað um kylling, høsnarunga og kjúling. Hesir næmingarnir vita, at kyllingur úttalast "tjidlingur" og hevur okkurt við hoyggj at gera.

Vit vóru á matstovu í høvuðsstaðnum nú ein dagin. Á matseðlinum stóð m.a. orðið kylling. Næmingarnir kjakaðust dúgliga um hetta orðið, men tann fryntliga gentan, sum borðreiddi fyri okkum, segði, at tað æt bara kylling, og at vit ikki máttu fjasast við sovorðið "grótføroyskt" sum høsnarunga ella kjúling. Tað æt eisini sugerør, og ikki súgvirør, sum eg hevði lært næmingarnar at siga. Ja, mangt er!!

**Hvat er til ráða at taka?**
Hvønn ákæri eg? Ja, m.o. meg sjálvan og Føroya skúla! Er okkurt galið við undirvísingini? Eru vit ov námsfrøðilig, ella kanska ikki nóg námsfrøðilig? Er móðurmálshugburðurin ikki tann rætti, ella ger líkasælan um seg? Er málsliga ávirkanin uttaneftir á okkara lítla, viðbrekna mál ov stór? Ber ikki til at verja borg?

Skúlafólk, málfólk, mugu viðgera støðuna og royna at finna gongdar leiðir burtur úr stavióskilinum. Okkurt má kunna gerast, sjálvt um eg ikki dugi at geva eitt einfalt svar upp á spurningin um hvat og hvussu!?!

Ð-trupulleikin hevði næstan horvið, um vit fóru at úttala eddið, sum íslendingar gera; men ikki hugsi eg, at tað er ein gongd leið. Nei, latið heldur eddið fáa frið! Í kvøldskúlanum hava vit onkuntíð tosað um, at bókstavurin, g, kann vera eitt sindur trupul í orðum sum *sá-sóu,* lá-lógu, dró-drógu, sló-slógu. Kanska kundu vit gjørt okkurt meira einfalt her!?!

At fáa alt undirvísingartilfar á føroyskum má vera okkara greiða stavnhald! Føroyskt eigur ikki bert at verða lært í føroysktímunum! Móðurmálsundirvísingin í fólkaskúlanum má styrkjast meira, soleiðis at hon fær minst líka nógvar tímar sum móðurmálsundirvísingin í okkara grannalondum! Danskundirvísingin kann byrja í 4. flokki, soleiðis at vit fáa grundfest móðurmálið, áðrenn vit byrja við fremmandamálum! Havi sjálvur royndir á tí økinum.

Allir sjónvarpstekstir í SVF mugu vera føroyskir, soleiðis at eygað eisini kann venja seg við føroyska málið! Hetta er sera týdningarmikið!

Annars havi eg í hesum skrivi als ikki viðgjørt bendingina, sum heldur ikki hevur so góðar umstøður í hesum tíðum. Har er eisini vandi á ferð!

Lat meg enda við einum snarskeiði í ð-seting!

**Snarskeið í ð-seting**

Húsið er málað
Huset er malet
Samanber við danskt (ella íslendskt)! Íslendingar úttala eddið!
Eitt NAVNORÐ í hvørkikyni, bundið, eintal, hvørfall og hvønnfall, endar við ð!
Ert tú í iva, um hvørkikynsorðið skal enda við ð, set so orðið, BÁTUR, inn í setningin! (BÁTURIN OG BÁTIN geva Ð!)
DØMI: Húsið er svart. (Báturin er svartur).
Eg sá húsið. (Eg sá bátin).

Eitt SAGNORÐ í tátíðar lýsingarhátti endar við ð!
Ert tú í iva, um eitt sagnorð skal enda við ð, set so orðið, DØMA, inn í setningin! (DØMT og DØMD geva Ð!)
DØMI: Eg havi málað. (Eg havi dømt).
Hurðin er málað. (Hurðin er dømd).